## DAGSINS MEINING

# Pensiónsmálið

Vit hoyra dómadagsprofetiirnar um hvussu ráðini ikki vera til at gjalda fólkapensión í næstu framtíð. Eitt samfelag, ið hevur ráð til fleiri 100 milliónir í umsiting og tosar um at seta listaskúlar og annað á stovn hevur sjálvandi ráð til at gjalda fólkapensión. Hevur man ikki ráð til at ansa eftir teimum gomlu, so hevur man ikki ráð at rópa seg vælferðarsamfelag - so einfalt er tað.

Uppskotið hjá samgonguni, ið nú liggur á borðinum, har hvør skal verða sær sjálvum næstur og spara upp til ellisárini, er einki annað enn ein tvungin ratupensión, har háinntøka merkir hápensión og láginntøka merkir lágpensión. Stættarmunurin verður forlongdur inn í ellisárini. Pensión skal ikki longur verða ein rættur, men egin ábyrgd. Føroyingar verða tveittir aftur til 1958, tí samgongan ætlar at tveita ábyrgdina fyri at taka sær av ellisárum út til borgaran sjálvan og arbeiðsmarknaðin. Hví kastar samgongan ikki bara eisini ábyrgdina frá sær tað tað kemur til sjúkrarøkt og skúlaverk? Soleiðis er tað í nógvum londum, og kann Fólkaflokkurin ikki hava nógv ímóti tí. Hjá teimum við samhaldsfesti í huga er stórur vandi á ferð. Loyva vit Landstýrinum at tveita pensiónsábyrgdina frá sær, so eru vit á einari glíðibreyt, har vit, áðrenn vit vita av, hava eitt samfelag, har borgarin noyðist at tryggja alt frá pensión til skúlagongd hjá børnum, soleiðis, sum støðan er í eitt nú USA. Undir øllum umstøðum fáa vit A pensionistar, teir við støðugum arbeiði gjøgnum alt sítt lív, og B pensionistar, heimagangandi, fólk, ið hava verið leingi uttanlands o.s.fr, ið skulu noyðast við eina minimumspensión.

At tað skal verða bíligari, at hvør borgari sparir upp til sín sjálvs heldur enn at lata pengar í eitt nú samhaldsfasta, er ikki rætt. Uppsparingin merkir frádrátt í skattinum, og merkir tað, at landskassin fær minni inntøkur, og so er líka vítt sum sítt.

Tað tykist verða ein greiður meiriluti á tingi fyri at víðka um samhaldsfasta, har fólk gjalda eftir førimuni og fáa tað sama útgoldið á ellisárum, óansæð hvat lívsstarv, man hevur havt. Tjóðveldisflokkurin var sjálvur við til at stovna samhaldsfasta, og hann tekur neyvan undir við einari Breckmannskari pensiónsskipan sum tann, ið fyriliggur. Ger hann tað, so er síðsta vetið av samhaldsfesti fokið.

Sámal Petur í Grund hevur skrivað seg sjálvan í føroyska søgu sum maðurin, ið niðurlegði skotlandssiglingina, og vísir tað strategisku evnini ella mangulin uppá sama. Vónandi sleppur hann ikki nú at skriva seg í søgubøkurnar, sum maðurin, ið tók hornasteinin undan vælferðarsamfelagnum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Springaradrápið í Sandagerði

Mads Guttesen

Eg kann ikki lata vera við at koma við nøkrum viðmerkingum/rættleiðingum, nú so nógv er skrivað í bløðunum og tosað í útvarpinum um hetta vanlukku springaradráp. Nógvar eru gitingarnar og sumt er beinleiðis skeivt. Tað eigur at vera eitt minstakrav, at bæði bløð og útvarp kanna málið so mikið, at tað tey endurgeva, er rætt. Soleiðis er ikki í hesum førinum, tí hesar reglur.

Fyri tað fyrsta: Sýslumaðurin hevur váttað í Rás 2, at hann ikki hevur givið forboð fyri at drepa springarar, ið hildnir vórðu til í Sandagerði. Hann hevði ætlanir um at gera tað, men varð ov seintur. Sostatt hava grindamenninir einki forboð fingið. Lat tað standa fast.

Tá løgreglan kom á staðið, var drápið langt síðan yvirstaðið. Springararnir sleipaðir heim á keiina og hálaðir upp. Tá var dekan og seint at koma við boðum um forboð.

Sosialurin skrivar, at býtið gekk fyri seg sum várharra gud veit, og at tann, ið frekastur og sterkastur var, fekk mest. Hetta er ósatt. Allir mans, niður til 14 ára gamlar dreingir, vórðu uppskrivaðir, bátarnir somuleiðis. Springararnir vórðu merktir og mettir. Síðan varð skift sum vanligt. Hetta skipaði Jákup Andrias Mohr, grindaformaður, saman við grindamonnunum fyri. Tað einasta, sum ikki var sum vanligt var, at fyri einaferð skyld fekk »palliba« alt. Hvørki sýslumaðurin, grindaformenn, politikarar o.a., ið vanliga fáa sín bróðurpart, fingu nakað.

Tað átti Sosialurin, ið sigur seg verja tann minni menta, at tikið við í síni grein, ístaðin fyri einsíðugt at niðurgera allan framferðarháttin hjá grindamonnunum.

Løgið tykist eisini, at tað nú, nakrir springarar eru dripnir í Havn, skal vera tann ovurhonds stóra vanlukkan. So vítt eg veit hava springarar tey nógvu seinastu árini verið dripnir her á landi. Bara teir seinastu mánaðirnar eru springarar dripnir fleiri ferðir. Tá hoyrdist ikki eitt kis, hvørki frá pressuni, myndugleikunum ella øðrum áhugaðum. Men nú hesi tandrini vórðu dripin í Havn, nú er deyðin í durunum og allar verðsins ólukkur fara at raka samfelagið alt. Heldur ikki tá tað, nakrar dagar eftir drápið í Sandagerði, vórðu dripnir yvir 400 springarar í Klaksvík og Hvalba, tosa ella skriva fjølmiðlarnir um tað, so tað er opinlýst, at tað er bert tá springarar verða dripnir í Havn, at ávísir persónar innan pressuna geva ilt av sær. Man kann so spyrja, hvat endamál teirra við hesum er.

Ein av grundgevingunum hjá sýslumanninum hevur verið, at so fáir springarar einki muna í Havn. Makan til tvætl skal man leita leingi eftir. Um springarar verða dripnir í t.d. Klaksvík ella í Havn kann væl vera líka mikið. *Teir ið luttaka fáa sín part.*

Vit hoyra nú í fjølmiðlunum, at sýslumenninir eru sera ósamdir um, hvørt tað skal vera loyvt at drepa springarar ella ikki. Helvtin er fyri at geva loyvi og helvtin vil sýta. Hetta er jú púra burturvið. Tað kann ikki vera rætt, at tað skal hava týdning, hvar tú býrt, um tú kanst fáa springaratvøst ella ikki!!! Lógin eigur at verða skrivað soleiðis, at hon skal tulkast líka av øllum.

Eg vil heita á teir, ið grindareglugerðina gera: Vælsignaðir, gerið reglurnar greiðar. Um totalforboð verður sett, ella tað verður loyvt at drepa springarar, er fyri so vítt líkamikið, men tað má vera annaðhvørt, ikki bæði-og, so menn hava greiðar reglur at ganga eftir. Tað kann ikki vera rætt, at ein tilvildarligur sýslumaður skal geva loyvi til at sýta fyri at geva loyvi. Á tann hátt verður tað alt ov tilvildarligt og hetta skapar ónøgd og óvissu, og tað kann rættarsamfelagið ikki liva við.

# Gevið John Petersen eina dýnu!

**Arnfinnur Thomassen**

Ikki síðan svidnaroykin av stoktum, fyrstafloks velbastaðhønum – av Hagaleiti seinasta ár – hevur so nógv rok verið í.

Orsøkin er dømingin í VB–B36-dystinum í Vági mikkjalsmessudag. Hon var heilt burtur úr vón og viti!

Av fyrstan tíð helt eg, at dómarin hevði eina floytu, sum bara kundi brískla ein veg: ímóti VB! Langt um leingi, so fekk pípan tó eisini annað ljóð. Men tað var týðuligt á eygnabrøgdunum, sum fóru millum dómaran og B36-leikararnar, at tað var ikki við hansara góða vilja, at hann dømdi teimum ímóti. Tað sá út sum um teir gingu í sama bindiklubba í Havn! (Hví ikki lata dómararnar fara norður aftur við tyrluni – tað havi eg fyrr skotið upp!)

Fótbóltssambandið eigur eisini at kanna, um ikki dómarin er forlovaður við onkrum B36-spælara! Tað kundi sæð soleiðis út!

Tá ið so málskorarin hjá VB, Robert Cieslewicz, varð sparkaður so meint aftanífrá (seinasti maður!), at hann skaddur mátti styðjast av vøllinum – og dómarin dømdi … INNKAST til B36! – tá vistu øll, hvussu vorðið var: høvuðsóttakenda kunngerðin um seyðaflutning var komin í staðin fyri fótbóltslógirnar!

Dómarin var so frekur, at hann bað Robert halda uppat at spæla sjónleik – áðrenn Robert varð borin av vølli!

Eg hoyrdi John Petersen eftir dystin siga við Útvarpið, at hann var snýttur! Hann átti minst eitt brotskast afturat! So frægt var Útvarpið, at teir í ítróttatíðindunum kl. 19.40 høvdu klipt orðini hjá dýnu-manninum burtur! Takk, Útvarp Føroya! Men

*Framhald á síðu 9*

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

# Hví torir eingin at spyrja?

**Hans Birgir Hansen**

**Sótu vit køld vegna vesturlendska profittspekulatión?**
Tað vóru tær multinationalu oljufyritøkurnar, sum við vilja skaptu oljukreppuna sigur danin Viggo Henning Flach, sum hevur roynt atfingið dons, amrikonsk, svensk og norsk bløð at bera hesi tíðindi. Sjálvt Ekstrablaðið tordi ikki, sigur danin V. H. Flach, ið sigur at talan er um størstu sensatión í veraldarsøguni, hann sigur at tíðindini umframt patentansøkningar hansara hava verið duld, tí tær stórpolitisku fylgirnar kundu gerast ov stórar.

Hevði verðin fingið sannleikan at vita fyri fimm árum síðani, høvdu tær oljufyritøkur ið selja olju og kjarnorkuverk verið farnar á heysin og vit høvdu livað av orku, ið kostaði ein tíggjunda part av tí vit í dag gjalda segði V. H. Flach í samrøðu við Dagblaðið

**Oljukreppan í 1973 tað reina fupp?**
**1. partur**
Dagblaðið bar stórtíðindi í 1979 frá V. H. Flach: Atomorka óneyðugt allastaðni sigur maðurin ið kann niðurseta orkunýtsluna við 90 prosentum. So stór vóru orðini ið Dagblaðið bar frá dananum V. H. Flach í 1979 tá hesin gjørdist kendur í Føroyum. Umboðsmaðurin hevur heitt á blaðið um at prenta greinina »Oljukreppuna« ið stóð í Dagblaðnum 14. mars 1979 tað gera vit her:
Tað vóru als ikki arabarar ið skaptu oljukreppuna í 1973. Tað vóru tær multinationalu fyritøkurnar. Orsøkin var at tær ynsktu at hækka oljuprísirnar samstundis sum ætlanin var at noyða atomorkuna inn á fólkið. Hetta sigur V. H. Flach sum í nógv ár hevur arbeitt við at niðurseta orkunýtsluna í hitatólum. Eg royndi beinanvegin at gera vart við meg sigur hann men politikarnir vildu ikki lata meg tosa og bløðini tordu ikki. V. H. Flach sigur at hóast hann var vitjaður av blaðfólki frá trimum av teimum framligastu donsku bløðunum at allir sum ein vóru á einum máli, at hetta var størsta sensatión teir høvdu verið úti fyri, so var einki nevnt teir tordu ikki sigur V. H. Flach.

**Søkti um patent – fekk einki svar!**
V. H. Flach sigur at hann fyri fimm árum síðani royndi at fáa patent uppá eina uppfinning sum skal kunna niðurseta orkunýtsluna í t.d. oljufýrdum ketlum við 80-90 prosentum. Roynt var bæði í Danmark, onglandi, USA. Vegna valdsmisnýtslu av stjórnum í teim ymsu londunum fekk eg ongantíð nakað svar sigur V. H. Flach. Hann sigur at hann síðani er vorðin kvaldur av bæði pressu og myndugleikum.

Teir hava tó stolið ein part av míni uppfinning til nýtslu í teim væl umtóktu evropeisku jumbojetunum »Airbuss« ið er vorðin ein »bestseller« innan flogferðsluna leggur hann afturat.

**Verðinsøkonomiurin – ein ruðuleiki! 2. partur**
V. H. Flach heldur fram at tað er tann høpisleysa økonomiska gongdin við eini inflatión ið eingin roynir at sleppa burtur frá, ið ger at tað t.d. verður nýtt 10 ferðir so nógv orka sum neyðugt er.

– Vit ganga upp gjøgnum ein stiga ið ikki tykist at fáa nakran enda. Einaferð fara trinini at vera tald. Hví ikki venda við nú? – Tankar mínir høvdu lopið hvøkk á innan økonomiska heimin; tí verið eg kvaldur. Annars hevur eingin loyvi at vera klókari enn teir »serkønu« leggur V. H. Flach afturat. Hann nevnir at einasta gongda leiðin burturúr ruðuleikanum er at gera eitt umfatandi arbeiði innan orkusparing. – Hetta var tað eg var í ferð við, tá ið eg søkti um patent fyri uppfinning mína sigur hann. Hann sigur at uppfinning hansara kann fáa oljufýr/ketil at hita eins væl við orkunýtslu uppá einans 10 prosent. – Eg havi gjørt fleiri slík oljufýr/ketil til fólk og trýr tú mær ikki, so spyr bara kundar mínar. Teir eru sjokeraðir leggur hann dent á.

Men eisini teir vera kvaldir. Danska og útlendska pressan má einki siga fyri myndugleikunum. V. H. Flach nevnir sum dømi at hann ein vetrardag kann halda eitt kamar heitt við eini orku uppá einans 70 kilocalorius um tíman. Skal eitt kamar í dag haldast heitt við t.d. elmegi, so fer ein effekt uppá 2.000 w um tíman. Hetta svarar til eini 1720 kilokalirius. – Fólk skilja helst munin millum 1720 og 70 sigur V. H. Flach.

**Atomorka fullkomiliga óneyðug! 3. partur**
V. H. Flach leggur annars dent á at heimurin ikki tørvar eitt einasta atomverk. – Verkini eru bara forrætningsfidusir sigur hann. Uppfinning mín kann gera øll slík orkutiltøk týdningarleys og tað vita tær mulinationalu fyritøkurnar. Eg sleppi bara ikki at greiða heiminum frá hugsanum mínum. – Uppfinning mín er annars ógvuliga einkul sigur hann.

**100.000 milliardir dollar tveittir burtur!**
V. H. Flach metir annars at fleiri hundrað túsund milliardir dollar eru tveittir burtur til einkis vegna vánaligan orkupolitik, síðani hann á fyrsta sinni royndi at greiða verðini frá, hvussu orka kundi sparast í stórum. – Hesar milliardir hava tey stóru firmaini sogið frá orkunýtarunum. V. H. Flach nevnir samstundis at teir høgu orkuprísirnir og tann stóra yvirnýtslan ikki bara gera seg negativt galdandi við beinleiðis búskaparligari forskjóting til tær stóru fyritøkurnar. – Hugsa tær til at orkunýtslan bert var 10 prosent av tí hon er. So hevði eitt land sum Føroyar havt nógv betri møguleikar at havt t.d. vakstrarhús. Hetta hevði ført við sær at føroyingar at endanum høvdu kunnað verið sjálvforsýnandi við grønmeti. – Eisini økir sum Grønland og Alaska høvdu fingið betri livikor til fólkið ið býr har sigur V. H. Flach.

**Hvør er hesin V. H. Flach?**
Viggo Henning Flach er av fyrsta tíð útlærdur innan handil. Hann starvaðist innan fiskavøruídnaðin eftir lokið prógv. Nakað eftir kríggið stovnaði hann saman við einum øðrum eina ídnaðarfyritøku; men hann hevur rikið virkið einsamallur tað mesta av tíðini. Hann hevur sett seg inn í hópin av tingum knýtt til samfelagið. Hann er kønur á so gott sum øllum økjum, eitt nú innan jura, handil, teknik, verksmiðju virksemi, uppfinning við meira.

Hann sigur í samband við orkusparandi uppfinning sína, at hann altíð roynir at nýta logik. – Tað er jú tað einasta heilin er egnaður til sigur hann at enda í samrøðu við Dagblaðið.

*Framhald av síðu 8*

SvF kundi víst, hvussu Robert lá eftir á! So kundi Føroya fólk sjálvt sæð, hvussu vánalig dømingin var!

Eingin, sum sá dystin við reiðuligum eygum, sá EITT EINASTA BROTSSPARK – til B36! (Men okur sóu brotssparkið, sum VB átti!) Meginpartin av seinna hálvleiki lá John Petersen bókstaviliga í VB-brotsteiginum.

Um John Petersen næsta kappingarár aftur ætlar at leggja seg »lit de parade«, so fáið eina dýnu inn á vøllin! Annars vil eg ynskja B36 tillukku við Føroyameistaraheitinum! GÍ og B68 fáa somu heiðursmerkjakvøður! VB var ov stutt – men okur koma sterkt aftur, dreingir!

Sjálvsagt er tað einki stuttligt hjá B36 at tapa seinasta dystin sum oddalið í fyrstu deild. B36 hevði ikki ein góðan dag. Serliga í fyrra hálvleiki vóru teir snøgt sagt spældir út av vøllinum! Men tað má bera til – uttan hjálp frá dómaranum og formanninum í dómarafelagnum – at fáa eitt heiðurligt úrslit.

# Vocal Group Ars Nova

*Í kvøld kl. 19.30 verður konsert í Norðurlandahúsinum við kenda danska kórinum Vocal Group Ars Nova*



TÍÐINDASKRIV

Hóskvøldið kl. 19.30 verður konsert í Norðurlandahúsinum við kenda danska kórinum Vocal Group Ars Nova. Við í kórinum eru 12 sangarar, og er hetta kór eitt tað besta í øllum Skandinavia, tey syngja serliga polyfonan og nýggjan kórtónleik.

Kórið hevur útgivið nógvar væl umtóktar fløgur og hevur sungið meir enn 1000 konsertir um allan heimin.

Kórleiðari er Tamás Vetö frá Ungarn, men kórið hevur eisinini arbeitt saman við so forkunnugum nøvnum sum: Peter Philips (The Tallis Scholars), Bruno Turner (Pro Cantione Antiqua) og Paul Hillier (The Hilliard Ensemble, Theatre of Voices), sum síðan 1997 hevur verið gestakórleiðari hjá kórinum.

Ars Nova hevur verið slóðbrótari innan polyfonan kórtónleik og hevur sungið meistaraverk eftir Josquin des Prez, Thomas Tallis, Orlando di Lasso og Giovanni Palestrina. Innan tann nýggja tónleikin stílar Ars Nova serliga eftir at syngja tónleik frá eftir uml. 1950.

Á konsertinini í Norðurlandahúsininum verða sungin m.a. verk eftir: Erik Bergman, Einojuhani Rautavaara, Cecilie Ore og Sunleif Rasmussen.